# Olav forseti

**Norðurlendski felagsskapurin fyri liberalar ungdómsfylkingar, N.L.R.U., valdi fyrr í mánaðinum Olav Enomoto úr Ungmannafelagnum Samband til forseta. Samstundis varð Michael Jensen eisini valdur til aðalskrivara**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Felagsskapurin N.L.R.U. hevur fingið nýggjan forseta. Olav Enomoto úr Vestmanna kann nú kalla seg forseta fyri felagsskapin. Styttingin N.L.R.U. stendur fyri Nordisk liberal og radikal ungdom. Felagsskapurin fær fíggjarligan stuðul frá Nordisk Ministerråd og er at meta sum ein sokallaður parably felagsskapur. Líknandi felagsskapar eru eisini fyri onnur politiskt ungmannafeløg, eitt nú fyri sosialistiskar ungdómsfelagsskapir.

Í felagsskapin rúmarst ungmannafeløg úr øllum norðanlondunum. Danska Venstre hevur tó, sum støðan er nú, ikki limaskap. Føroyski parturin av felagsskapinum er Ungmannafelag Samband, sum, óneyðugt at siga, er felagið fyri ung sambandsáhuga.

Á aðalfundi fyrr í mánaðinum valdi felagsskapurin nýggjan forseta og aðalskrivara. Hesir gjørdust báðir úr Ungmannafelagnum í tí, at Olav Enomoto gjørdist forseti og Michael Jensen gjørdist aðalskrivari.

28 ára gamli vestmenningurin og hálvi japanarin, Olav Enomoto, kann nú sum ikki so mangur annar í Føroyum kalla seg fyri forseta.

–Eg veit ikki, hvussu nógv eg skal leggja í heitið, men eg meti hetta sum ein greiðan álitissess, har eg fái møguleikan at samstarva við onnur norðanlond, sigur Olav Enomoto.

Uppgávan hjá forsetanum verður at standa á odda fyri felagsskapinum. Michael Jensen skal hinvegin taka sær av dagliga rakstrinum av felagnum.

Hini norðanlondinum eiga øll umboð í stjórnini í N.L.R.U.



*Teir báðir, Olav Enomoto og Michael Jensen, eru vorðnir ávíkavíst forseti og aðalskrivari í norðurlendsku felagsskapinum N.L.R.U.*

*Mynd: Álvur Haraldsen.*

# Vónin hevur eitt fjølbroytt virksemi

**- Vit spenna rættiliga víða, og felagið er aktivt á so gott sum øllum økjum, tá ið ræður um trol og nótir, sigur John Poulsen, stjóri.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*- Tað er soleiðis, at tey størstu trolini mugu greiðast og umvælast úti, um nógv er at gera við tey. Tí plaga vit at strekkja hesi á gamla leirvíksvegnum, og tað er ein stór hjálp, sigur John Poulsen*

Í Sosialinum í gjár høvdu vit samrøðu við John Poulsen, stjóra á P/F Vónini, um ætlaninar at byggja ein stóran bygning niðanfyri oljutangarnar á Viðarnesi í Havn. Somuleiðis greiddi stjóri frá, at Vónin júst hevur keypt seg inn í eitt trolvirki í Nuuk í Grønlandi.

## Býtt upp í deildir

At gera og umvæla trol og nótir, krevur nógv pláss, og næstan líka mikið, hvussu stór hølir Vónin enn hevur, verður tað neyvan nakrantíð soleiðis, at alt arbeiði kann gerast undir taki.

Felagið hevur býtt sítt virksemi upp í deildir; í Havn arbeiða teir við botntrolum, eitt nú rækjutrolum. Í tí eina bygninginum í Fuglafirði verða flótitrolini gjørd og umvæld. Ein nýggjur bygningur er eisini bygdur, sum serliga verður brúktur til snurpinótir. Hesin er býttur upp í »krubbur«, sum kraftblokkaskipini hava keypt sær. Summi skip hava tvær krubbur, onnur tríggjar. Her kunnu skipini goyma sínar nótir og flótitrol. Í erva eru stórir kraftblokkar, sum kunnu draga nótirnar og trolini. Hesi skip skifta reiðskap alla tíðina — alt eftir, hvar tey royna, og hvørjum fiskaslagi tey royna eftir.

- Í ár hava skipini trolað eftir lodnu í føroyskum sjógvi, og tað hevur vístseg at rigga væl, tá ið fiskurin stendur djúpt. Men tá ið tey fara aftur í íslendskan sjógv at royna, taka tey nótirnar umborð aftur, tí har er ikki loyvt at trola eftir lodnu, vísir John Poulsen á.

## Krevur nógv pláss

Stjórin sigur, at tey stóru flótitrolini krevja ógvuliga nógv pláss, tá ið tey eru illa fløkt og skulu greiðast aftur.

- Tað er soleiðis, at tey størstu trolini mugu greiðast og umvælast úti, um nógv er at gera við tey. Tí plaga vit at strekkja hesi á gamla leirvíksvegnum, og tað er ein stór hjálp.Hann vísir á, at teir fremstu meskarnir í teimum stóru flótitrolunum eru upp í 64 metrar langir, tá ið teir eru strektir eftir longdini. Síðan minka teir niður í helvt, so hvørt tú kemur longur aftur í trolið; meskarnir minka nevniliga úr 64 metrum niður í 32 metrar, síðan niður í 16 metrar, 8 metrar, 4 metrar, 2 metrar og 1 metur. Afturi í posanum koma meskarnir niður í 80 mm., tá ið talan t.d. er um svartkjaftatrol.

- Hesi trolini eru úr 500 uppí 700 metrar long, og tey størstu kunnu »gapa« einar 2000 metrar! vísir John á. Tað hevur hent seg fyrr hjá Vónini, at illveður er komið á, soleiðis at trolini erufokin oman í hagan við leirvíksvegin, men slíkt hendir ikki aftur, tí nú verða trolini fest allan vegin, so illveður einki ger við tey.

- Í løtuni hava vit eitt trol hjá Christiani í Grótinum liggjandi á leirvíksvegnum. Hetta trolið skal umvælast og gjøgnumgangast, men nú kavi liggur, gerst einki, tí trolið er undirkavað, sigur John.

## Sóttreinsa alinótir

Virksemið hjá P/F Vónini spennir rættiliga víða.

- Vit hava eisini tað gamla nótavirkið uttanfyri Havsbrún. Her gera og umvæla vit nótir til alivinnuna. Uttast á enninum hava vit eitt vaskarí til alinótir við stórari “vaskimaskinu”. Her verða alinótir úr øllum landinum sóttreinsaðar, umvældar og impregneraðar av nýggjum. Tá ið hesar verða settar útaftur, eru tær sum nýggjar.

John vísir á, at Vónin hevur riggað seg væl til á hesum øki og brúkt nógvan pening til tess at nøkta tørvin hjá alivinnuni.

- Neyðugt er at vera góðkendur av heilsumyndugleikunum, um tú skalt fáast við slíkt virksemi, og hesar góðkenninar hava vit. Virksemið hjá okkum er góðkent bæði av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Djóralæknastovninum, sigur hann.

## Gera fortoyningar

- Eg vil siga, at vit fevna yvir so gott sum allan »sektorin«, tá ið ræður um trol og nótir, bæði til fiskivinnuna og alivinnuna. Aftrat hesum gera og selja vit fortoyningar til alivinnuna, umframt at vit selja nógva aðra útgerð til hesa vinnu.

John vísir á, at Vónin t.d. ger lidnar fortoyningsskipanir til einar 8-10 ringar, so hesir liggja tryggir, har teir verða lagdir út, tað veri seg bæði á deyðavatni og úti á streymasjógvi. Vit uppbyggja eina skipan við togum, ketum og akkerum, og felagið hevur gjørt sær stóran royndir á hesum øki.

- Tað eru stór virðir, sum skulu tryggjast við hesum fortoyningum, so tað er sera umráðandi, at skipaninar eru haldgóðar og tryggar. Ikki minst, nú aling eisini fer fram úti á streymasjógvi, sum er ein avbjóðing fyri seg.Stjórin vísir á, at nógvastaðni er rættiliga harðbalið, har aliringar liggja. Tí er hetta ein stór uppgáva, sum Vónin hevur lagt seg eftir at loysa fyri síni viðskiftafólk.

## Nýggj hugskot

- Vit arbeiða eisini við hugskotum um, hvussu ringasti streymurin kannútihýsast á einum aliøki, t.d. við at seta net upp, sum kunnu taka broddin av streyminum.

John sigur, at hesar royndir verða gjørdar, tí ynskiligt er, at alivinnan fær fleirimøguleikar úti á streymasjógvi.

- Skulu vit hava eina enn størri alivinnu, sum málið er, mugu loysnirfinnast, og hetta er so ein møguleiki. Inni á deyðavatni dálkar alingin sjálvsagt nógv meira enn úti á streymasjógvi, har botnurin verður reinsaður so hvørt, sigur John Poulsen, stjóri á P/F Vónini, at enda.



*P/F Vónin arbeiðir við hugskotum um, hvussu ringasti streymurin kann útihýsast á einum aliøki, t.d. við at seta net upp, sum kunnu taka broddin av streyminum.*
*- Hesar royndir verða gjørdar, tí ynskiligt er, at alivinnan fær fleiri møguleikar úti á streymasjógvi, sigur John Poulsen*



# Ógvusligt og yvirdrivið arkitektoniskt



*- Tað er áhugavert at síggja eitt slíkt uppskot, men nógv viðurskifti, ikki minst viðvíkjandi ferðslu og parkering, skulu kannast og loysast fyrst, sigur Gunnar Hoydal um Skálaborg*

**- Skálatrøð er tað mest spennandi byggiøkið, sum er eftir í býnum, og fyrr ella seinni verður bygt á økinum. Men uppskotið um Skálaborg sýnist mær ógvusligt. Bygningurin hóskar ikki inn í umhvørvið og er fyri mær ikki sannførandi, sigur Gunnar Hoydal, fyrrverandi býararkitektur í Havn**

SKÁLABORG
*Turið Kjølbro*

- Skálatrøð er tað mest spennandi byggiøkið, sum er eftir í býnum, og eg ivist ikki í, at tað ber til at fáa eina fantastiska bygging har. Tað liggur mitt í hjartanum í býnum, og liggur nærum og bíðar eftir, at onkur byggir á tað. Síðani økið varð sprongt, hevur tað ligið óliðugt viðgjørt og brúkt sum parkeringspláss. Onkustaðni skulu bilarnir vera, men eg havi altíð hildið, at tað er heilt skeivt at gera parkeringspláss har, sigur Gunnar Hoydal, fyrrverandi býararkitektur í Havn.

Nógvar hava ætlanirnar verið, sum eru lagdar á Skálatrøð. Ætlanin hjá samtakinum Routunda at byggja ein 7000 fermetra stóran bygning við íbúðum, handlum og øðrum á Skálatrøð, er bert tann seinasta í røðini. Ola Steen, sum teknaði Norðurlandahúsið, metti á sinni, at Norðurlandahúsið átti at ligið á Skálatrøð. Síðani hava uppskot til eldraíbúðir, hotell og enntá eitt løgtingshús verið til Skálatrøð.

Størsti trupulleikin at byggja á Skálatrøð er ferðslan og parkering. At har er so ringt at koma til og frá.

- Sigmundargøta er heilt vónleys at koma ígjøgnum, somuleiðis Grím Kambansgøta. Einasti møguleikin er at troðka seg ígjøgnum Vágsbotn. Tí er eisini skeivt at leggja parkeringspláss har. Parkeringspláss skulu liggja nær við høvuðsferðsluna, har tað er lætt at koma til og frá, sigur Gunnar Hoydal.

## Tankin góður

Serliga sjónskur verður ferðslu- og parkeringstrupulleikin, um ein so stórur bygningur sum Skálaborg verður lagdur á Skálatrøð.

- Sum er eru eini 160 parkeringspláss til dagparkering á Skálatrøð. Í sær sjálvum krevur ein bygging á 7000 fermetrar við íbúðum, skrivstovum og handlum í minsta lagi 150-200 parkeringspláss umframt.

Sjálvur dámar Gunnari Hoydal best uppskotið á sinni hjá arkitektunum Gudmundi Hansen og Alberti Isfeldt um eldaíbúðir, sum lógu inn ímóti berginum.

- Tað hevur nakað við støddir at gera. Skálatrøð var eina ferð ein trøð, sum gekk oman ímóti sjónum. Eldraíbúðirnar í fyrra uppskotinum bygdu seg út frá berginum, og tí sýntist tann ætlanin ikki so ógvuslig. Hetta nýggja uppskotið er rættiliga nógv øðrvísi, bæði í formi og dimensjónum. Tað er áhugavert at síggja eitt slíkt uppskot, tankin er góður, men nógv viðurskifti, ikki minst viðvíkjandi ferðslu og parkering, skulu kannast og loysast fyrst.

- Bygningurin sýnist mær ógvusligur og onkusvegna yvirdrivin arkitektoniskt. Hann liggur frítt miðskeiðis á økinum, við einum torgi í miðjuni, og hann tekur seg ikki upp fyri húsini, sum liggja aftanfyri. Men sum hann er vístur á myndum, hóskar hann ikki inn í umhvørvið. Fyri mær er ætlanin ikki sannførandi.

- Hinvegin er ikki lætt at útiloka nakra ætlan á Skálatrøð, men tað verður ikki lætt at leggja ein 7000 fermetra stóran bygning á økið. Skrivstovur og handlar krevja parkeringspláss. Skrivstovur høvdu ligið væl á Skálatrøð, men góð øki til skrivstovur eru løgd aðrastaðni í býnum, sigur Gunnar Hoydal.

## Nýggj ferðsluæðr

Skal nakað byggjast á Skálatrøð, má nýggjur vegur gerast úr J.C. Svabosgøtu oman á Skálatrøð.

- Tað er næstan neyðugt fyri at loysa ferðslutørvin, sum verður. Fyrr ella seinni verður okkurt bygt á Skálatrøð. Tað er heilt givið. Onkur bygningur, sum ger økið meiri livandi og upplivilsisríkt. Tað kundi eitt nú verið eitt býarhús til mentunartiltøk. Ein slíkur bygningur hevði ikki nervað ferðsluna so nógv, tí mentunartiltøk eru sum oftast um kvøldið og tá er ferðslan ikki so nógv. Í løtuni liggur vestaravág nakað deyð. Hinvegin liggja nakrir fantastiskir bygningar vestanfyri, Müllers Pakkhús, Skeivapakkhús, fabrikkin hjá Østrøm millum aðrar. Hesir kunnu verða ein herligheit fyri býin í framtíðini, sigur Gunnar Hoydal at enda í viðtali.



*- Fyrr ella seinni verður okkurt bygt á Skálatrøð. Onkur bygningur, sum ger økið meiri livandi og upplivilsisríkt, sigur Gunnar Hoydal, fyrrverandi býararkitektur*

# Fleiri kvinnur á ting

**Grønlendski kvinnuflokkurin Arnat Partiiat stillar upp til Landstingsvalið við tí endamáli, at fáa fleiri kvinnur inn á ting**

POLITIKKUR
*Turið Kjølbro*

Grønlendsk konufólk vilja ikki longur lata sær lynda, at ov fáar kvinnur mynda politiska valdið í Grønlandi. Tískil er felags kynspolitiska stríðið um sessirnar í politisku valdsdeplunum langt frá lagt á hillarnar. Grønlendski kvinnuflokkurin Arnat Partiiat er nevniliga til reiðar at stilla upp sum sjálvstøðugur flokkur til Landstingsvalið, sum verður í hesum árinum. Flokkurin hevur sum mál at fáa fleiri kvinnur inn um tinggátt. Harafturímóti er flokkurin eisini til reiðar at verða upploystur, tá ið talið á kvinnum og monnum í tinginum er javnt.

Arnat Partiiat hevur í dag 50 limir. Hvussu nógvir teirra stilla upp, er enn ikki greitt. Men flokkurin fer ikki bert at viðgera sokallað bleyt politisk evni, sum eitt nú, hvat er best fyri barnið og familjuna. Sambært Helgu Nielsen, skrivari í flokkinum, viðger flokkurin onnur evni á jøvnum føti. Teimum slepst ikki undan, sigur hon.

# Norðurlendski samleikin styrkjast

**Børn og ung í Norðurlondum skulu hava størri ávirkan, heldur Norðurlendska Ráðharraráðið**

NORÐURLOND
*Turið Kjølbro*

Børn og ung í Norðurlondum skulu hava størri ávirkan. Og arbeiðast skal ímóti nýnasismu og fremmandahati millum ung í Norðurlondum. Hetta eru tvey av høvuðsmálunum, sum Norðurlendska Ráðharraráðið undir leiðslu av norðmonnum, fer at virka fyri í ár. Laila Dåvøy, sum er barna- og familjumálaráðharri í Noregi, ynskir at styrkja tilvitið millum ung um norðurlendska samleikan og mentanararvin. Hetta skal fremjast ígjøgnum eina røð av ítøkiligum verkætlanum, tiltøkum og ráðstevnum. Umframt fara norðmenn at skipa fyri einum serligum tiltaki fyri børn og ung í norðurvestur Russlandi og nærumhvørvinum. Til várs savnast allir ráðharrarnir í Norðurlondum, sum hava ábyrgdina av barna- og ungdómspolitikki, til at tosa um, hvat kann gerast til frama fyri børn tvørtur um øki. Í heyst verður eitt stór mentanartiltak í Oslo undir heitinum Felagsskapur og mentanarligt margfeldni. Málið er at skapa eitt netverk í Norðurlondum fyri mentanarvirksemi millum minnilutabólkar.